# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Jákup Dahl Olsen til minnis



Ringt var at finna tónan har úti á kirkjugarðinum í Havnardali, hendan ilskliga heystardag, har illýsið brann í landsynningi við grovum avfalli. Ófjálg var løtan, tá vinur okkara stillisliga varð loraður niður undir. Hann hoyrdi ikki heima har – í hvussu so er ikki enn, hildu vit. Hvat rennur fram fyri teg í hesi løtu? – Mangan søgdu vit hvør við annan á veg úr kirkjuni út í kirkjugarðin: »Hatta eiga vit á, Ívar!« Høvdu vit tað í huga, góvu vit tí gætur? Jú! Tað gjørdu vit. Tú og eg sleppa ikki at liva so leingi. Vit njóta lívið; eta og drekka okkum um rygg og hava tað gott, kundi tú mangan siga.

Við klumpi í hálsinum stóðu vit mangan og royndu at syngja sum frægast. Avvarðandi teirra, ið út vórðu borin, niðurboygd av sorg og trega. Tað nívdi okkum. Vit harkaðu, royndu at hosta uttan at hostin stóð okkum í hvørkrunum. Kveittu hvør upp á annan og skundaðu okkum úr kirkjuni út á kirkjugarðin. Hann vegleiddi okkum, hvussu syngjast skuldi. »Hatta er ov høgt! Ein hálvan ella kanska ein heilan tóna niður; annars fer eingin at syngja saman við okkum«.

Tá ið okkara góði og trúgvi vinur, Jákup Dahl Olsen, varð borin út, var klumpurin í hálsinum sterkur. Tað strongdi har á. Kortiliga sungu vit av insta hjarta við honum í huga, tá tað forgeingiliga fór undir heilt. –

Góði Jákup! Vit høvdu so nógv saman. Ikki altíð á einum máli. Hví skuldu vit eisini tað? – Vit vóru valla komnir til mans, tá vit gingu úti á VBV síðst í 40-árunum. Blíðskortaða andlit títt, ið altíð lýsti av góðsemi fjálgaði um okkara langa vinalag.

Vit eiga tað á. Hvíl í friði góði Jákup.

**Ívar og allir hinir sangararnir**

## Carl Herup Olsen deyður



Fríggjadagin 22. oktober andaðist Carl Herup Olsen í Havn, 86 ára gamal.

Carl Herup varð føddur á Eiði 28. desember 1917. Stutt eftir flutti familjan til Vágs at búgva.

Liðugur við skúlan fór hann í 1934 í handilslæru hjá firma J.A. Hjelm í Vági.

Tá lærutíðin var av, fekk hann í 1941 arbeiði á skrivstovuni hjá J.F. Kjølbro í Klaksvík, og var hann har í átta ár.

Á vári 1949 avgjørdu Carl Herup og starvsfelagin, Poul Als Jensen, at gevast hjá Kjølbro og stovnað partafelag saman við Børge Husted-Andersen, sakførara.

Poul Als og Carl Herup fluttu so báðir við familju til Keypmannahavnar.

Farodane varð stovnað í Keypmannahavn 1. oktober 1949.

Teir byrjaðu við at selja ymiskar matvørur til handlar í Føroyum.

Eisini keyptu teir føroyskan saltfisk og fryst rogn, ið bleiv selt til Danmarkar og aðrastaðni.

Tað sást skjótt, at best mundi verða, at Carl Herup bleiv fastbúgvandi aftur í Føroyum.

Tí varð avgjørt, at hann skuldi flyta heimaftur við familjuni og verða leiðari av eini søludeild her. Hetta varð gjørt, og teir byrjaðu í Bókbindaragøtu 6 í Havn tann 1. september í 1950.

Í 1952 fekk fyritøkan umboð fyri VW bilarnar

Í 1954 flutti Farodane í egnan virkisbygning við Tinghúsvegin í Havn. Har kom skrivstovuútgerð, sum fyritøkan er kend fyri, inn í myndina.

Felagið í Keypmannahavn helt fram til 1965, tá Poul Als Jensen gavst vegna sjúku.

Í 1942 giftist Carl Herup við Annu, f. Nystrøm, ættað av Húsum, tey fingu fimm børn: Ólavur, Jóngerð, Regin, Randi og Jósvein.

Síðan 1976 hava Anna og Carl Herup saman við elsta soninum, Ólavi, staðið fyri felagnum. Í 1980 varð flutt inn í nýggjan virkisbygning í Hoyvík.

Síðan 1983 hevur Ólavur verið stjóri í fyritøkuni.

Carl Herup gavt at arbeiða í 1994, men hann var nevnarformaður í felagnum og hvønn dag - bæði fyrrapart og seinnapart - vitjaði hann á fyritøkuni, og fylgdi hann væl við gongdini.

Saman við øðrum hevur hann spælt tennis í minsta lagi tvær ferðir um vikuna seinnu árini.

Hann var ein av stinnastu bridge-spælarunum í Havnar Klubba, har hann var limur og verið formaður í tveimum umførum. Hann var limur í Rotary-felagsskapinum, har hann eisini hevur verið forseti.

## Símun í Túni 50 ár



Í dag, týsdagin 26. oktober, verður Símun í Túni á Toftum 50 ár. Hann hevur í meiri enn eina fjórðingsøld verið trúboðari millum tey innføddu í frumskóginum í Venezuela.

Símun er sonur Maju og Júst í Túni og næstyngstur av átta systkjum. Hann er giftur við Daniu Didriksen úr Runavík, og tey eiga fýra børn: Tamara, sum var liðug í studentaskúlanum í fjør, og sum nú er á háskúla í Danmark, Erik, sum arbeiðir fisk á Toftum, og Stefany og Isabel, sum ganga í Tofta skúla.

Tá ið Símun vaks upp, vóru Toftir - á sama hátt sum bygdin framvegis er tað - útróðrarbygd og fiskivinnubygd, og áhugin fyri seyðahaldi var og er stórur hjá nógvum. Pápin var sjómaður og skipari, og Símun hevði frá barnsbeini av stóran hug at veiða og fáast við seyð og at eygleiða náttúruna á sjógvi og landi. Sum smádrongur og stórur skúladrongur var hann onkran túrin við pápanum, sum førdi Brest og Bein og seinni Sildrekan, sum hann saman við øðrum átti. Áðrenn Símun fór av landinum, var pápin farin at ala síl í Skálafirði og á Oyrabakka, og Símun var ógvuliga áhugaður í øllum, sum hevði stert, og hann nýtti hvørja løtu, sum tað bar til, at hjálpa pápanum.

Yrkisleiðin tóktist sjálvsøgd hjá evnaríka og arbeiðssama dreinginum, men Símun brúkti ikki síni bestu ár í fiskivinnuni og alingini. Tað gjørdi hann ikki, tí hann frá blaðungum av hevði kent eina byrðu fyri teimum úti í stóru verð, ið ongantíð høvdu hoyrt evangeliska boðskapin, sum Símun var uppvaksin við og hevði hoyrt heima við hús, í samkomuni á Toftum og í Zarepta, har áhugin fyri trúboðanini varð kveiktur.

Eftir at hava lokið realprógv á Glyvrum og túrar til skips við Havalduni hjá D. P. Højgaard, sum Daniel Jacob Hansen førdi, fór Símun á heysti í 1971, áðrenn hann hevði fylt seytjan, til USA at fyrireika seg til at verða trúboðari millum teirra, sum gleðiboðskapurin var púra fremmandur fyri. Í 1975 fór hann til Venezuela. Burtursæð frá tíðarbilunum, tá ið hann var heima og helt frí, var hann í frumskóginum inntil á sumri í 2000. Í 1983 giftist hann við Daniu, sum var honum hollur stuðul í frumskóginum, har tey bæði megnaðu at varðveita føroyska samleikan hjá sær og børnunum, samstundis sum áralagið var gott saman við amerikanarum og fólki aðra staðni frá, sum tey arbeiddu saman við.

Símun og familjan trivust ógvuliga væl millum tey innføddu. Eftir at hava lært spanskt, lærdi hann málið og mentanina hjá yanomami ættarbólkinum, sum býr á gróðrarríka háslættanum báðu megin markið millum Venezuela og Brasilia. Hann var við til at menna skriftmálið hjá indianarunum, sum umvegis New Tribes Mission, sum Símun er partur av, hava havt møguleika fyri skúlaskapi.

Í frumskóginum hevur Símun arbeitt eitt nú við heilsurøkt, og tá ið deyðstalið millum tey innføddu tók at falla orsaka av betraðum skúla- og heilsuumstøðum, kendi Símun ábyrgd fyri at læra tey innføddu, sum fóru at fjølgast, hvussu tey kundu fáa meiri av mati. Ikki minst í menningini av støðugari vatnveiting og innlæring av førleikum í sambandi við at leggja matvøruframleiðslu til rættis, komu royndirnar frá uppvøkstrinum á Toftum Símuni til góða.

Fyri okkum, sum hava vitjað í frumskóginum, hevur tað verið eyðsýnt, at Símun hevur tikið tey innføddu at sær, og at tey halda ógvuliga nógv av honum. Tað er heldur ikki ov nógv sagt, at Símun við síni virðiligu og sáttligu framferð og góðu evnum at umgangast fólk hevur vunnið álit hjá venezuelsku myndugleikunum, sum ofta hava vent sær til hansara, tá ið teir í hesum frumskógarøkinum hava havt fyri neyðini at fara undir okkurt átakið, ella tá ið teir eitt nú hava ivast í, hvussu markið móti Brasilia í júst hesum økinum eigur at vera.

Alt annað arbeiði og øll onnur menning hevur havt sum endamál at røkka tey innføddu við gleðiboðskapinum. Símun hevur saman við øðrum verið við til at umseta partar av Skriftini til málið hjá teimum innføddu - hetta fæst hann framvegis við - og hann hevur í mong ár miðvíst lært einstaklingar og flokkar ráð Guds, sum ikki so fá innfødd hava fingið eyguni upp fyri og gleðast í og um.

Hóast Símun bara var knappliga 17 ára gamalur, tá ið hann fór heimanífrá, og hann var burturi og millum fremmand í mong ár, so er hann merkiliga óspiltur føroyingur og toftamaður. Hann hevur altíð gjørt nógv fyri at varðveita sambandið við heimlandið og føðistaðin, sum hann er serliga góður við. Í skiftunum, tá ið hann hevur verið heima, hevur hann hoyggjað og gingið á fjall, sett sildagørn, skotið fugl, róð út og verið til skips, eitt nú við Brimnesi, sum Hans í Norði átti og førdi. Tá ið tað fyri góðum fýra árum síðani varð neyðugt hjá familjuni at flyta aftur til Føroya, fall tað raðið hjá Símuni aftur at fara at fáast við seyð og eplavelting og egning og útróður og landing og at fylgja við í veðri, vindi, streymi og sjóvarfalli samstundis sum hann yvir internetið er við í arbeiðnum í frumskóginum, har hann stundum vitjar í arbeiðsørindum. Í huganum er hann hvønn dag millum tey innføddu, og hann fegnast um, at føroyingar framvegis eru har yviri og luttaka í missiónini í Venezuela.

Símun hevur verið burturstaddur flestu rundu føðingardagarnar. Nú er hann heima á Toftum, og 50 ára dagurin fer at verða hildin á Svangaskarði sunnudagin 31. oktober, har tað frá klokkan fýra seinnapartin verður opið hús.

Góði svágur! Hjartaliga tillukku og takk fyri gott vinarlag og góðar løtur her heima á klettunum, í Keypmannahavn, har tú og seinni tit plagdu at vitja okkum, og fyri ógloymandi ferðina í 1998, tá ið tað bar Sannu, mær og gentunum til at halda jól saman við tykkum í frumskóginum.

**Jóannes**



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Óli Niclassen 30 ára starvsdag:

## Vaks upp uttan bilar í Mykinesi

**Fríggjadagin 22. oktober var móttøka hjá bilasøluni DB Bilum í Havn, í sambandi við at verkstaðsleiðarin Óli Niclassen hevur arbeitt í fyritøkuni í 30 ár**

MÓTTØKA
*Myndir: Magnus Gunnarsson*



*Derek Brockie handar Óla ein málning av Sámal Toftanes sum gávu frá D.B. Bilum. Derek og Óli lærdu saman og hava arbeitt saman meginpartin av lívinum*

Vinir og kenningar hjá Óla og nógvir av kundunum hjá D. B. Bilum stukku inn á gólvið til hugnaligu móttøkuna fríggjadagin.

Tað var ikki tí, at Óli var uppvaksin við bilum, at hann fór í læru sum bilmekanikari.

Hann er nevniliga uppvaksin í Mykinesi uttan nakran bil. Upprunaliga skuldi hann í læru á maskinverkstaðnum hjá Vilhelm Nielsen, men tað bleiv í staðin á bilverkstaðnum hjá Frits Jensen í Gundadali, har sum Statoilstøðin er í dag.

Har lærdi hann saman við nógvum góðum monnum sum t.d. Derek Brockie, Eivind av Reyni, Trúgva Jacobsen, Høgna Hansen, Finn Bisp, Rógva Hansen, og brøðrunum Suna og Oddmar Rasmussen. Verkførari var Naddoddur Jacobsen. Óli var hjá Frits Jensen til 1973.

Eitt skifti var hann verkførari á bilverkstaðnum hjá Ivan Johansen.

Síðan 1974 hevur Óli arbeitt hjá Derek Brockie.

Derek sigur, at Óli er ein álitismaður og er ein av bestu bilmekanikarunum í landinum. Tað vísir seg at nógvir av góðu gomlu kundunum framvegis koma á verkstaðin, hóast teir í dag koyra við øðrum bilmerkjum.



*Hildibjart Johansen, sum hevur konu úr Mykinesi, heilsar upp á Óla*



*Góðir gamlir kundar: Zakarias Wang og Mads Guttesen*



*Ein veteranur í bilbranchuni, Karl Wolles, og Bogi Ellingsgaard, sum eins og Óli er ættaður úr Mykinesi*




*Starvsfólkini hjá D. B. Bilum, f.v. Jákup Martin á Válinum, Leivur Petersen, Jens Erik Rasmussen (Rass), Rúni Joensen, Carsten Ottosen, Óli Niclassen, Hans Kári Hansen, Signhild Wolles, Derek Brockie og Alan Brockie*

### Dagurin

**26. oktober. Amandus**. Fleiri halgimenni bera hetta navnið, og allir hava teir verið biskupar, og allir hava sama halgidag. Ikki er gjørligt í dag at gera av, hvønn sipað verður til.

Navnið er av latínskum uppruna og merkir: *tann sum eigur at verða elskaður.*

### Prógv

Signar Petersen úr Sandavági hevur tikið djóralæknaprógv (Cand. med. vet.) á Den Kongelige Veterinær- og Landbohøjskole í Keypmannahavn.

## Tøkk

Eina hjartans tøkk vil eg fegin bera øllum tykkum, sum á ymsan hátt mintist til mín og harvið gleddu meg á 70 ára føðingardegnum 26. august.

*Blíðar heilsanir*

**Kristina Bech**
**Porkeri**

†

Kunngjørt verður, at kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Gordon Johannesen**
ættaður frá Gjógv,
búsitandi í Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjakvøldið 22. oktober, 71 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin 26. okt. kl. 13.00,

*Familjunnar vegna*
**Kristianna**
**Vagn, Asbjørn, Sólrun, Maritt og Suni**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, abbi, langabbi og verðfaðir okkara

**Carl Herup Olsen**
Tórshavn

andaðist fríggjadagin 22. oktober, 86 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin 26. oktober kl. 15.

*Familjunnar vegna*
**Anna**